LM-088/2023

Løgtingslóg 18.

**Gunnvá Ellendersen**

**Fra:** Familjufyrisitingin
**Sendt:** 6. februar 2024 12:04
**Til:** Elsa Magnussen
**Emne:** Svarskriv til uppskot um løgtingslóg um fosturtøku (fosturtøkulógin)

Góða Elsa,

Fleiri børn eru ættleitt sambært ættleiðingarlógini, talan er tá um stjúkbarnaættleiðingar.

Viðv. innanlands ættleiðing skal munur gerast á fremmanda innanandsættleiðing og innanlands familjuættleiðing.

Viðv. at tað kann vera trupult at burturættleiða eitt barn til innanlands ættleiðing í Føroyum, orsakað av at Føroyar er eitt lítið samfelag, kann vísast á, at foreldur, sum burturættleiða eitt barn, antin við tvingsli ella samtykki, kunnu sum nú er seta fram ynski um, at barnið ikki verður ættleitt til Føroyar, men heldur til Danmarkar. Somuleiðis kunnu foreldur seta fram ynski um, at eitt barn skal ættleiðast til onkran í Føroyum.

Familjufyrisitingin skal vísa á, at soleiðis sum vit hava skilt tað, umsitur grønlendska umsitingin sjálv innanlands listan av børnum leysgivin til fremmandaættleiðing í Grønlandi.

Vit kunnu eisini vísa á, at galdandi ásetingar sum viðvíkja tvingsilsættleiðing í Føroyum eru munandi øðrvísi enn í Danmark. Tað kemst av, at ásetingarnar viðvíkjandi tvingsilsættleiðing eru broyttar nakrar ferðir gjøgnum tíðina í Danmark, men hesar broytingar vóru ikki settar í gildi fyri Føroyar. Í sambandi við yvirtøkuna av familjurættarliga økinum vóru ásetingarnar um tvingsilsættleiðing ei heldur broyttar.

Annars hava vit ikki viðmerkingar.
**Vinaliga**

Monica Hjelm Rasmussen
*stjóri*

FAMILJUFYRISITINGIN
THE FAMILY LAW ADMINISTRATION

Dr. Jakobsens gøta 21
100 Tórshavn
Føroyar

Tel +298 20 22 24
famf@famf.fo
www.famf.fo

*Øll málsviðgerð í Familjufyrisitingini er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.*